**2. innleiðandi umfar í Mentanarhúsið í Fuglafirði leygarkvøldið 1. februar kl. 21.00**

## Speaker

**Janus Rasmussen – sang**
**Bogi Berg – gittar og sang**
**Sigurd Justinussen – trummur**
**Jan Jensen – bass**
**Rúni Christiansen – gittar**

Bólkurin byrjaði at venja í einum kjallara úti á Norðasta Horni í Havn fyri einum góðun ári síðani.

Teir hava spælt til tvær konsertir, báðar á Margarinfabrikkini í Havn, og móttøkan serliga á seinnu konsertini varð góð.

Stílurin varierar frá hørðum rocki til melodiøsan og melankolikan tónleik.

## Holgar & Villmenn

**Holgar Jacobsen – sang og gittar**
**Steven Foggin – trummur**
**Jákup á Stongum – gittar og kór**
**John Edvin Joensen – bass**

Bólkurin er mannaður við trimum sørvingum og einum breta, sum er búsitandi í Miðvági. Sørvingarnir eru kendir innan føroyska tónleikaheimin, líka síðan síðst í trýss-unum.

Manningin hevur verið við á fleiri fløguútgávum: Við Randandi Fjøll, Ghost Riders, Jørgen & Jákup og »Súrt og fólkaligt« við Villmonnum.

Tónleikurin fevnur, sum nevnt í síðstu fløguútgávuni, heilt frá súrum til fólkaligt. Til konsertina hesuferð er tónleikurin mest rockur, kanska enntá harður rockur, sjangran er tó ikki so at seta í bólk! Tiltikni vágasoundurin má sigast verða toygdur í hvørjari lykkju.

Bretin, sum spælir við villmonnunum er Steven Foggin, sum er tónleikalærari í Musikskúlanum, og sum er stinnur at spæla trummur.



## Deja Vu

**Líggjas Olsen – sang og ljómborð**
**Flóvin E. Viderø – sang og gittar**
**Rói Christiansen – gittar**
**Rógvi Rasmussen – bass**
**Rúni W. Højgaard – trummur**

Deja Vu var stovnaður í 2000, tá ið bólkurin Siesta fekk ein nýggjan gittarspælara. Navnið á bólkinum var tá broytt til Deja Vu. Síðani hava teir spælt til ymisk tiltøk, so sum Prix Føroyar 2001, miðnámsveitsluna 2001, til dans og eisini hava teir spælt akkustisk sett á caféum.

Í 2002 vóru teir við í eini tónleikakapping í Grenå, og har endaðu teir sum nummar 2 av 10 bólkum. Síðani august hava 4 av manningini verið á tónleikaháskúla í Vig í Danmark.



Tónleikurin er heimagjørdur við inspiratión frá nógvum ymiskum bólkum so sum Sting, Radiohead, Turin Brakes og Elbow. Teir royna tó at gera nakað, teir kunnu kalla egið.

Aftaná Prixið er ætlanin at fara í holt við at gera eina fløgu. Um alt gongur væl, kemur hendan út seinni í ár.

## Mind's Eye

**Eyðun Mortensen – sang**
**Hans við Neyst – gittar**
**Palli Klein – gittar**
**Regin Mortensen – bass**
**Jens Pauli Joensen – trummur**

Bólkurin byrjaði fyri eini seks ár síðani. Tá var talan um bólk við gittari, bassi og trummum, men ongum sangara. Síðani bólkurin var stovnaður havi ikki verið góðar umstøður at venja í. Leitað hevur verið eftir høli í fleiri ár til í 2002, tá ið aftur var byrjað í kjallaranum hjá bassspælaranum. Tað gekk ikki leingi við tí larminum, men tað skilja teir væl.

Síðani var aftur farið at leita, teir gingu inn allastaðni, men eingin eydna. Ikki fyrr en guitarspælarin ein dagin kom heim frá arbeiði og pápi hansara hevði frætt um eini høli. Teir lógu fram við, og tað eydnaðist umsíðir.

2. juni 2002 fingu teir ein sangara fyri fyrstu ferð, og hann hevur verið síðani tá. Teir høvdu ein annan trummuspælara, men hann varð skiftur út. Nú er tað Jens Pauli Joensen, sum hevur áður hevur spælt í øðrum bólkum, sum syrgir fyri rútmunum.

Teir spæla harðan rocktónleik.



## Masha hevur flutt umfar

**Vágabólkurin skuldi spæla leygarkvøldið, men nú eru teir fluttir til 3. umfar. Sostatt verða tað fimm bólkar við í umfarinum um vikuskiftið**

UMFØRINI
*Eyðun Klakstein*

29 bólkar eru við í teimum fimm innleiðandi umførunum. Tað merkir, at í einum av umførunum skulu fimm bólkar kappast, meðan seks bólkar eru við í øllum hinum umførunum.

Upprunaliga ætlanin var, at fimm bólkar skuldu vera í 3. umfar, men nú er vágabólkurin Masha fluttur frá 2. til 3. umfar.

Orsøkin er, at teir hava fingið nýggjan sangara.

Hesin sangari kann ikki vera í Føroyum, tá ið 2. umfar er, og tí stóð valið ímillum at flyta umfar ella at taka seg úr kappingini.

Tað merkir, at fimm bólkar fara at kappast nú leygarkvøldið. Teir eru Déjá Vu, Mind's Eye, onkikanndiskuterast.alt kann, Holgar og Villmenn og Speaker.

Hóast bara fimm bólkar eru við í hesum umfari, eru treytirnar fyri víðari luttøku tær somu. Vinnarin av umfarinum kemur í finaluna, meðan 2'arin sleppur at kappast í hálvfinaluni miðskeiðis í mars mánaði.

Tá ið hetta umfarið hevur verið, verða tað sostatt fimm bólkar í øllum innleiðandi umførunum, sum eru eftir. Í finaluni verða seks bólkar.

## Onkikandiskuterast.alt kann

**Johannes Johannesen – gittar og róp**
**John Holgarson – bass og róp**
**Hans Erling Guttesen – trummur og róp**
**William Olsen – trummur, slagverk og róp**
**Karl Anton Klein – gittar og gallróp**



Karl Anton Klein er tann sum rópar harðast í bólkinum. Í øllum førum boða almennu upplýsingarnar frá, at meðan hinir rópa, so er tað uppgávan hjá Karl Anton at gera gallróp. Eingin »sangari« er í bólkinum, men allir bjóða seg fram at rópa.

Karl Anton Klein er kendur frá ymsum samanhangum í føroyskum tónleiki, hann hevur bæði spælt í bólkum og sum einstaklingur.

Hesin bólkurin hevur ikki verið frammi áður, men teir siga, at teir spæla sína egnu blanding av »heavyfólkapunkablues við einum ferili av polka og jassi, vanliga í tí harðara endanum.«








